# Stórdjóraæti í Hetlandsrennuni

**Tvey sløg av ljóskrabba (krill) mynda í stóran mun nøgdirnar av stórdjóraæti (macrozooplankton) í Hetlandsrennuni, men eisini pílormar (*Sagitta*) eru at finna í stórum nøgdum í økinum.**



Høgni H. Debes
lívfrøðingur

Av stórum djóraæti er tað serliga krill sum dominerar í økinum sunnan fyri Føroyar. Tíggju ymisk sløg av krill vórðu funnin, har serliga 2 sløg vóru at finna í stórum nøgdum í økinum. Hesi bæði sløgini eru sera ymisk til støddar. Annað slagið kallast *Meganyctiphanes norvegica* og kann blíva upp til 7 cm til longdar, meðan hitt slagið, *Thysanoessa longicaudata*, bert blívur uml. 1½ cm (Mynd 1).

Av øðrum stórum djóraæti vóru serliga pílormar (*Sagitta* spp) at finna í stórum nøgdum í økinum.

Í verkætlanini, sum byrjaði í mai 2001 og endaði í juni 2003, vóru royndir tiknar á 3 støðum tvørtur um Hetlandsrennuna (Mynd 2).

**Nøgdir av djóraæti**

Nøgdinar av stórum djóraæti varieraðu nógv ígjøgnum árið. Nøgdin av krill var hægst um summarið og um veturin (Mynd 3). Um summarið vóru tað mest smærri krill, gýtt um várið, ið vóru funnin í royndunum. Um veturin var tað framvegis tann sama generatiónin, sum domineraði í royndunum, men eftir at hava vaksið í nakrar mánaðar vóru tey blivin nakað størri.



*Mynd 1. Tey bæði høvuðssløgini av krill sunnan fyri Føroyar. Ovast: M. norvegica. Niðast: T. longicaudata.*





*Mynd 2. Kort av havleiðunum kring Føroyar. Teir tríggir bláu rundingarnir í Hetlandsrennuni vísa hvar royndirnar vóru tiknar, og heiti á støðunum.*

Nøgdirnar av pílormum vóru meiri javnt høgar alt árið. Tó var mest av smáum pílormum um summarið og stórum um veturin.

**Lívfrøðin hjá krill**

Lívfrøðin hjá teimum báðum dominerandi sløgunum av krilli í Hetlandsrennuni er lík. Tann yngsta generatiónin, gýtt um várið, av *T. longicaudata* sást í royndunum longu í juni mánaði.

Ábendingar vóru eisini um, at *T. longicaudata* kanska gýtir í tveimum umførum í økinum sunnan fyri Føroyar, fyrru ferð um várið og seinnu ferð um summarið.

**Loddrætt ferðing**




*Mynd 3.* *Nøgd av krill pr. 1000 m³ í Hetlandsrennuni.*

Stórdjóraæti er kent fyri at ferðast upp og niður gjøgnum sjógvin (upp um náttina og niður um dagin). Okkara royndir vístu, at serliga *T. longicaudata*, og til ein vissan mun eisini *M. norvegica* og pílormar, bera seg at á henda hátt.

**Vatnrætt rák av stórdjóraæti**
Havstreymarnir í Hetlandsrennuni eru soleiðis, at á djúpum vatni, djúpari enn uml. 500 m, er rákið í ein útsynning, meðan tað í teimum ovaru løgunum gongur í ein landnyrðing. Hetta merkir at stórdjóraætið verður ført í ein útsynning um dagin, tá tað er á djúpum vatni, meðan tað um náttina, tá tað er grynri í sjónum, verður ført mótsattan veg. Líkt er tí til, at stórdjóraæti heldur seg í økinum.




*Mynd 4.* *Støddardiagram av Thysanoessa longicaudata í juni á teimum trimum støðunum í Hetlandsrennuni.*